Stýrimaður hjá Fiskiveiðieftirlitinum:

# Datt fleiri metrar niður av kavrotnum loðsleytara

**Í gjáramorgunin datt ein stýrimaður hjá Fiskiveiðieftirlitinum í fríum falli niður á ein arbeiðsbát hjá Tjaldrinum, tí loðsleytarin á Vesturtúgvu, sum maðurin kleiv uppeftir, slitnaði av rotinskapi**

*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*



*Kavrotni leytarin hekk á Vesturtúgvu úr Sandavági. – Men tað eru heilt vist fleiri skip, ið ikki hava leytarin í lagi, sigur Óli Hans Hammer Olsen, stjóri á Skipaeftirlitinum.*

*Mynd: Skipalistin 2005*

Arbeiðsbáturin hjá Fiskiveiðieftirlitinum fór í gjáramorgunin at kanna ísfiskatrolaran, Vesturtúgvu, úr Sandavági. Manningin umborð á arbeiðsbátinum sigldi móti Vesturtúgvu, og fyrstur at klíva upp á trolaran var ein stýrimaður hjá Tjaldrinum. Hann kleiv upp gjøgnum leytaran, men tá hann kom tríggjar metrar upp, slitnaði kavrotni leytarin. Maðurin datt flatur niður aftur í arbeiðsbátin, fekk allan leytaran oman yvir seg og var ikki førur fyri at reisa seg aftur.

Hinir menninir umborð á arbeiðsbátinum gjørdu skjótt av og sigldu alt fyri eitt aftur til Tjaldrið, ið við skundi setti kósina móti Landssjúkrahúsinum. Á sjúkrahúsinum tóku portørar og læknar ímóti manninum, ið var illa fyri:

– Tað kundi havt endað heilt galið, men maðurin er sera heppin og er tíbetur sloppin nøkulunda frá hendingini. Hann hevur brotið ein ryggjargeisla og liggur enn á Landssjúkrahúsinum, men hevur tað gott eftir umstøðunum, sigur Jóannes Heimustovu, sum starvast á Fiskiveiðieftirlitinum.

– Slíkt eigur ikki at henda. Menninir hjá okkum arbeiða við málinum, og somuleiðis hevur Skipaeftirlitið fingið boðini, leggur Jóannes Heimustovu afturat.

Óli Hans Hammer Olsen, stjóri á Skipaeftirlitinum, sigur, at sjálvandi fer Skipaeftirlitið at kanna málið, men enn er endalig støða ikki tikin, hvussu kanningin fer fram:

– Men vit taka støðu fyrsta dagin. Vesturtúgva hevur í øllum førum ábyrgdina. Tað stendur í lógunum, at leytarin og annar útbúnaður á báti skal verða í lagi.

– Hetta er ein ræðulig hending, ið ikki eigur at koma fyri. Útbúnaðurin umborð á fiskiskipum í Føroyum er rættiliga ójavnur. Tað eru heilt vist fleiri skip, ið ikki hava leytarin í ordan. Hetta skal fáast í rætt lag, og vit fara at arbeiða víðari við málinum, sigur Óli Hans Hammer Olsen.

**Vesturtúgva harmast**

Háldan Gudmundsen, útgerðarmaður á Vesturtúgvu, er sera harmur um álvarsomu hendingina:

– Vit keyptu leytaran í 2001, og vanliga heldur ein slíkur leytari í 12 til15 ár. Vit hildu væl stóð til, vistu av ongum og sóu einki uttan á leytaranum, men noyðast tíverri at ásanna, at leytarin var kavrotin innan. Høvdu vit vitað tað, høvdu vit alt fyri eitt bílagt ein nýggjan, tí leytarin og annar útbúnaður umborð á einum fiskiskipi skal vera í lagi, sigur ein harmur Háldan Gudmundsen.



# Jákup á Dul økt um sítt virksemi

Miðjan mars keypti Jákup á Dul 49 handlar í Bretlandi. Talan er um fínar møblahandlar, ið kallast Pier.

– Teir vóru sera bíliga til sølu, tí fíggjarliga gekk ikki væl hjá handlunum. Men handlarnir hava stórt virði, og eg ætli mær at broyta teir og gera teir enn betri. Í løtuni eru bert 49 av hesum møblahandlunum til í Bretlandi, men tað ber til at lata heili 120 handlar upp. Tískil ætli eg fyrst at broyta handlarnar og síðan at lata fleiri handlar upp. Higartil hevur tað gingið væl, sigur Jákup á Dul í stuttari viðmerking.

Til ber at lesa meira um handlarnar á heimasíðuni www.pier.co.uk.

**- horsdal**






Lesið Sosialin so eru tit við